Atlants Kolvetni á miðvísari kós:

# Skjótt eitt framleiðandi oljufelag

OLJUMENNING
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni, sum nakað herfyri keypti seg inn í fleiri oljufelt í Norðsjónum, hevur nú tikið enn eitt týðandi stig at gerast eitt veruligt oljufelag. Nú er farið undir at menna eitt av hesum feltum, Chestnut Fiaeld. Tað er bretska oljufelagið Venture Production, sum er fyristøðustøðufelag og harvið stendur á odda fyri menningini av feltinum. Fyrsta oljan frá Chestnut gerst veruleiki í 2007. Eisini menningin av einum øðrum felti, Perth gongur framá.

Wilhelm Petersen, stjóri sigur, at við nýggjastu tilgongdini á Chestnut feltinum hevur Atlants Kolvetni tikið eitt týðandi stig víðari at gerast eitt veruligt oljuframleiðandi felag. – Vit kenna okkum tryggar við teir samstarvspartarnar vit hava fingið og at her er talan um eitt búskaparliga skilagott projekt. Tann tøkni, sum verður brúkt og menningin sjálv sannførir okkum um, at vit fara at vinna pengar úr at menna smærri olju- og gassfelt.



*Wilhelm Petersen, stóri í Atlants Kolvetni fegnast um gongdina hjá felagnum, sum hann heldur vera sera skilagóð*

# Omanlop við Gjógv



*Myndatekstur: tíbetur var eingin bilur á vegnum, tá m.a. hesin stóri steinurin kom bóltandi oman av fjallasíðuni*
*Mynd: Sofus Debes Johannesen*

**Tíðliga týsmorgunin var omanlop oman móti vegnum til Gjáar, omanfyri Funning. Stórir og smáir steinar komu bóltandi oman ímóti vegnum, men tíbetur hendi eingin skaði**

OMANLOP
*eydna@sosialurin.fo*

Tað kundi lættliga havt endað galið, men lukkutíð hendi omanlopið so tíðliga, at ferðslan framvegis ikki varð byrjað.

Ein rættiliga stórur steinur og fleiri smærri komu brádliga bóltandi oman móti vegnum. Umframt tað, vóru eisini aðrir stórir steinar, sum ikki komu heilt oman ímóti vegnum, men tíbetur steðgaðu í einum gili omanfyri.

Lukkutíð kom eingin steinur á vegin, tí tað hevði stongt vegin.

Fram við hesum vegastrekkinum er sera brætt, og javnan koma smáir steinar oman á vegin, serliga tá tað toyar um várið.

Tað er sera sjáldsamt, at størri omanlop sum hetta eru, men vandin er tó altíð á ferð. Omanlopini saman við nógva kavanum og hálkuni um veturin ger, at gjáarfólk bíða ótolin eftir einum bergholi, so farleiðin til bygdina gerst tryggari.

# Atgongumerki sum avsláttur

**Sum partur av fyrsta handilsdegnum, læt Damor 75 atgongumerki til fyrstu kundarnar**

NÝGGJUR HANDIL
*Jákup Mørk*

Lýsingarnar vóru í flestu miðlunum í gjárkvøldi. 75 teir fyrstu kundarnir, sum keypa fyri meira enn 1.000 krónur, fáa eitt atgongumerki til landsdystin afturat vøruni, sum teir hava keypt.

Og tað var eisini fitt av fólki, sum hevði lagt lýsingina til merkis. Áðrenn dyrnar vórðu lætnar upp, var fitt av fólki at síggja, og flestu av hesum keyptu eisini fyri meira enn túsundkrónuseðilin, sum kravdist, um atgongumerki skuldi fylgja við.

Fyrstur at fáa vøruna um diskin var Hans Jacob Heinesen úr Havn.

- Eg skuldi kortini hava fatur á eini blandimaskinum, og so kundi eg jú akkurát tað sama keypa hana her, helt hann, tá hann væl nøgdur tók ímóti atgongumerkinum.

Og blandimaskinan verður helst eisini tikin í nýtslu skjótt. Hans Jacob er ein av teimum mongu, sum nú fara undir at byggja hús í Hoyvíkshaganum Suður, og so er slík maskina jú hent at hava.




*Tað verða fyrst og fremst við lágum prísum, at Damor nú fer at taka upp kappingina á byggimarknaðinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Kappast um prísin

Per Joensen, sum er stjóri á Damor, sigur, at teir við nýggja handlinum vilja royna at gerast partur av marknaðinum fyri byggitilfar og tað, sum har til hoyrir.

- Vit fara framhaldandi at hava opið á Argjum, og tann handilin er jú als ikki tann sami, sum hesin.

Men við hesum koma tit kanska fyrst og fremst at taka upp kappingina við stóru timburhandlarnar. Eru tað ikki tungir kappingarneytar at hava.

- Sjálvandi. Men vit rokna við, at tað fer at bera til. Fyrst og fremst, so satsa vit upp á at hava góðar prísir. Tú sært jú eisini, at talan her meira er um eina goymslu enn um ein veruligan handilsbygning. Vit royna í allar mátar at halda kostnaðinum niðri, soleiðis at vørurnar á tann hátt gerast bíligari hjá kundanum, heldur Per.